

Vegna 26 ára starvsdag sum gullsmiður verður sveina-stykkið at síggja í Gullhorninum.

Samstundis verður latið 26 % í avsláttri á gullleinkjum og ringum.

Tilboði er galdandi mánaðin út.

Gullhornið

v/ L.E.H.N • Bringsnagøta 1 • Dandastova
FO-100 Tórshavn • Tel. 314430 • heima 318361



## Frá Happadráttinum

Seinasti søludagur til 1. drátt er 21. august

Seðilin spælir við í trimum dráttum

70% av søluvirðinum verður latið til vinningar

HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTINUM



A T U

**BMW 318i st. car**
Ár. 06 - 1997
Nógv útgerð s.s. klima, el-rútar, sóltak o.a

**Citroen Xantia Turbo Diesel**
Ár. 03 - 1996

**Mazda 626**
Ár. 1989

**Audi A6 2,5 TDI automatic v.m**
Galvaniseraður
Ár. 1994

**BMW 525 2,5 tds Diesel**
Ár. 07 - 1996 aut · Tlf. 51 77 04

**Nissan Bluebird**
Ár. 10 - 1987

**Mitsubishi Galant**
Ár. 06 - 1991

Vit hava 50cc Vespa Piaggio skutarar á goymslu




*Úrvalsbilar Spf.*
*530 Fuglafjørður*
*tel. 444943 · fax 444638 · far. 217704*



## Arbeiði

Sóknast verður eftir einum fólki m/k at arbeiða nakrar tímar um vikuna.

Arbeitt verður frá kl. 14.00 til 18.00 allar yrkadagar.

Ert tú fyrikomandi og fryntlig/-ur, er hetta starvi møguliga nakað fyri teg.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring og hoyr nærri á tlf. 21 53 28 ella støkk inn á gólvið millum kl. 14.00 og 18.00.



HAVNAR BIO
★ Tlf. 11956 ★






Klædnahandilin Hjá Giggi til sølu við innbúgvi.

Møguleiki er at halda áfram í leigaðu hølunum.

**Sp/f Grannsko an Jóannis Skorheim**
Postsmoga 139 · Klaksvíksvegur 28
FO-700 Klaksvík · Tlf. 478 000


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3640
**Navn:** Sp/f Knút H. Nielsen
**Adressa:** 800 Tvøroyri
**Kommuna:** Froðbiar Kommuna
**Stovningardato:** 26.06.2003
**Viðtøkudato:** 26.06.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Knút H. Nielsen, 800 Tvøroyri.
**Stjórn:** Knút H. Nielsen, 800 Tvøroyri.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f HanSam, Tróndaargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 26.06.2003 - 31.12.2003.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka vinnu innafyri timburarbeiði o.a. handverk í tí sambandi.

*Skráseting Føroya tann 11. august 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3638
**Navn:** Sp/f Línbúðin
**Adressa:** Tróndargøta 32, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 01.07.2003
**Viðtøkudato:** 01.07.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Marin Brimsvík, Norðari Ringvegur 1, 100 Tórshavn og Ann Maiken Madsen, Hagagøta 2, 160 Argir.
**Stjórn:** Marin Brimsvík, Norðari Ringvegur 1, 100 Tórshavn og Ann Maiken Madsen, Hagagøta 2, 160 Argir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.07.2003 - 31.12.2003.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og annað virksemi sum hevur samband við hesa vinnu.

*Skráseting Føroya tann 11. august 2003*

*Kristin Balle*


## Fimleikur – callanetice

Callanetice fimleikur byrjar týskvøldið 19. august kl. 18.00.

**Lærarar:**
Steintóra H. Nesá, tlf. 444720
Áshild Kristiansen, tlf. 444621

Tekning og nærri boð fáast frá lærarunum.

**Luttøkugjald:**
Einaferð 200 kr. + 2 kr./tíman
skal gjaldast fyrsta kvøldið!

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**tlf. 444087**



## Hús til sølu

Sethúsini á Geilini 42, Klaksvík, til sølu. Húsini eru 164 m². Vindeygu, hurðar og tak skift í 1998.

Minsta boð 1,2 mill.

**Tlf. 217355 best aftaná kl. 17.00**



Lesið Sosialurin -tað loysir seg



## Mini-gravmaskina

Alt arbeiði við mini-gravmaskinu, so sum urtagarðar, smáir vegstubbar, grava fyri kaðalum o.a., verður gjørt.

**Fa. Hans P. Hansen**
477 Funningsfjørður
Fartlf. 212631 • Heimatlf. 441631

Ring og fá eitt tilboð
*Vit taka minstu uppgávur í størsta álvara.*



veitst tú ikki tað?

www.sosialurin.fo




# Heystskeið á Føroya Handarbeiðsskúla

**Skeið í skinnseyming/leðurseyming:**
Lært verður at seyma úr gomlum skinnpløggum og leðurlutum. Seymast kunnu t.d. taskur, beltir, vestar, pungar og mangt annað. Eisini ber til at fáa gomul pløgg (lutir) sum nýggj aftur.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Anna E. Abrahamsen.*

Tilmelding: Tlf. 457152 og 218121
Kostnaður: 300 kr. + tilfar
Tíðarskeið: Vika 46
Undirvíst verður frá kl. 8.45-15.10.

**Skeið í broderí:**
Lært verður at: Brodera/montera turriklæði, fyriklæði og kýsa til føroysk klæðir. Brodera vest til føroysk klæðir. At gera bregda hosu- og tólvtáttabond.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Paulina Eliasen.*

Tilmelding: Tlf. 456614 og 218121
Kostnaður: 500 kr. + tilfar
Skeiðið verður hesar dagarnar: 11/9 - 12/9 - 18/9 - 25/9 - 2/10 - 9/10 - 30/10 - 6/11 - 20/11 - 27/11.
Undirvíst verður frá kl. 8.45-15.10.

**Skeið í tøving:**
Lært verður at tøva stykkir og at forma til ymiskar brúkslutir. Formtøva hattar, húgvur, skógvar, taskur o.a. Lita ull, tøva myndir og prýða við broderí.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Anna E. Abrahamsen.*

Tilmelding: Tlf. 457152 og 218121
Kostnaður: 500 kr. + tilfar
Skeiðið verður hesar dagarnar: 8/9 - 9/9 - 15/9 - 16/9 - 23/9 - 28/10 - 5/11 - 24/11 - 25/11 - 1/12 - 2/12.
Undirvíst verður frá kl. 8.45-15.10.

**Skeið í garving:**
Lært verður at garva skinn og roð.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Karin Jacobsen.*

Tilmelding: Tlf. 455598 og 218121
Kostnaður: 300 kr. + tilfar
Tíðarskeið: Vika 43
Undirvíst verður frá kl. 8.45-15.10.

**Maskinbinding fyri byrjarar:**
Lær tína bindimaskinu at kenna. Lær at koma í gongd at binda einkul pløgg.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Sunrid Hansen.*

Tilmelding: Tlf. 218121
Kostnaður: 200 kr.
Undirvíst verður hesar dagarnar: 20/8 - 21/8 - 22/8.
Undirvíst verður frá kl. 8.45-15.10.
*Havið egna bindimaskinu við.*

**Kreativ skriving:**
Eitt royndarskeið, ið møguliga kann halda fram eftir nýggjár. Hugsanin við skeiðnum er at fáa næmingarnar í gongd við at skriva yrkingar, søgur o.a. Nýttir verða ymiskir teknikkir.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Maria Mørkøre.*

Tilmelding: Tlf. 458055 og 218121
Kostnaður: 100 kr.
Undirvíst verður hesar dagarnar: 3/11 - 4/11.
Undirvíst verður frá kl. 8.45-14.00.

**Tekning:**
Lær at tekna á spennandi hátt. Lær rúmd, dýpd, skuggar o.a. Nýttir verða ymiskir teknikkir.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Maria Mørkøre.*

Tilmelding: Tlf. 458055 og 218121
Kostnaður: 500 kr.
Tíðarskeið: Vika 35-36
Undirvíst verður frá kl. 8.45-14.00.

**Tekning:**
Lær at tekna á spennandi hátt. Lær rúmd, dýpd, skuggar o.a. Nýttir verða ymiskir teknikkir.

Undirvísari á hesum skeiði verður:
*Maria Mørkøre.*

Tilmelding: Tlf. 458055 og 218121
Kostnaður: 500 kr.
Undirvíst verður týskvøld, byrjar í viku 37.
Undirvíst verður frá kl. 19.00-22.00.

**Um skúlan:**
Føroya Handarbeiðsskúli byrjaði í 1995. Á skúlanum hava verið nógv ymisk skeið, longri og styttri. Skúlin er ein dagskúli.

Um tað eru einstaklingar ella bólkar, ið hava serstøk ynskir um skeið, kunnu tit ringja á:
tlf. 457152, og spyrja eftir Onnu E. Abrahamsen
ella á tlf. 456614, og spyrja eftir Paulinu Eliasen.

Nøktandi undirtøka og góðkenning frá myndugleikunum er ein treyt fyri, at skeiðini kunnu gerast veruleiki.

Skúlin tilskilar sær rætt til møguligar broytingar í skánni.

**FØROYA HANDARBEIÐSSKÚLI**
**Tlf. 218121 • Jørisgøta 8 • FO-700 Klaksvík**

SANDAVÁGS KOMMUNA

**Sandavágs kommuna søkir við hesum eftir**

## Námsfrøðingi

**til Sóljugarð í Sandavági.**

Stovnurin er í 4 eindum, settur saman við 2 vøggustovum 2 barnagarðsstovum.

Í okkara dagliga arbeiði leggja vit m.a. stóran dent á:
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at tey ekkaleys kunna fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum
- At vit seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At sum mest gjørligt, at vera úti saman við børnunum
- At hava gott foreldra- og starvsfólkasamstarv

**Lønarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir avtalu, sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala arbeiðsgevararfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hervør Olesen, leiðara á tlf. 333930, millum kl. 13.00 og 17.00.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu vera

**Sandavágs kommunu**
360 Sandavágur

í hendi í seinasta lagi 25. august 2003, viðmerk á brævbjálvan »starvsfólk«.

Kommunan skilir sær rætt til, um ikki nóg nógvar umsóknir eru at lýsa av nýggjum.


## HÚS Á TORVHEYGGI



**Til sølu, um hóskandi boð fæst**

Bygd: 1989
Støð: 129 fermetrar
Grundøki: 1029 fermetrar

Barnavinarligt umhvørvi.

**Áhugaði – ringið 372 135 ella 220 735**
**Terji Nielsen, Tvøroyri**


Lesið Sosialurin -tað loysir seg